# Ólavur Arge í klønum tráð

**Far úr starvi ella tú verður koyrdur frá. Sum skilst eru hesi boðini, sum Ólavur Arge, stjóri í Vinnuframagrunninum, hevur fingið frá Vinnumálaráðnum. Tó vilja hvørki advokaturin hjá Ólavi Arge, Jóhan Dahl, landsstýrismaður, ella fyrisitingin í Vinnumálaráðnum vátta tíðindini. Men Ólavur Arge sjálvur, veit ikki at svara, um hann situr í sessinum í morgin**

VINNUFRAMAGRUNNUR
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

*Ert tú framvegis stjóri í Vinnuframagrunninum?*

– Ja.

*Verður tú framvegis stjóri í morgin?*

– Tað kann eg ikki svara uppá.

*Er tað rætt, at tað er heitt á teg um at siga teg úr starvi, og um ikki, so verður tú uppsagdur?*

– Nú spyrt tú so nær. Eg haldi tú skalt tosa við Sigmund Poulsen um hatta.

Ólavur Arge vil ikki gera fleiri viðmerkingar um støðu sína sum stjóri í Vinnuframagrunninum.

## Onki ultimatum

Men tað vil Sigmund Poulsen, advokatur hjá Ólavi Arge, fegin úttala seg, men heldur uppá, at onki ultimatum er komið.

– Tað passar ikki. Tað eru ongi boð um nakað ultimatum komið og heldur onki, sum líkist tí, sigur Sigmund Poulsen.

Men hann leggur afturat, at er tað rætt, at Vinnumálaráðið er farið uttan um hann við einum tílíkum ultimatumi, so hevur ráðið gjørt tað lort fyri seg sjálvt.

## Fyrisitingarligt mál

Tað er greitt tilskilað í viðtøkunum hjá Vinnuframagrunninum, at tað er landsstýrismaðurin, sum setir stjóra í grunninum. Orðarætt stendur í grein 8, at landsstýrismaðurin setur stjóra.

Men landsstýrismaðurin hevur ongar viðmerkingar til Vinnuframagrunnin.

– Eg blandi meg ikki upp í fyrisitingarlig mál, sigur Johan Dahl, landsstýrismaður.

## Fyrisitingin tegir

Og fyrisitingin vil heldur onki siga.

– Úttala okkum ikki í einum máli, sum er í gongd, so hatta kann eg ikki gera nakrar viðmerkingar til, sigur Maria Róin, deildarstjóri, sum saman við øðrum hevur arbeitt við Vinnuframagrunninum og stjóranum í grunninum.

# Peningastovnar stinga rentustuðul í egnan lumma

TÍÐINDASKRIV
*Fíggjarmálaráðið*

- Føroyskir peningastovnar hava tikið seg rættiliga væl betaltar í provisjónum og ómaksgjøldum, tá vanlig sethúsalán hava verið løgd um til realkredittlán, men tað er føroyski skattgjaldarin, sum í hvørjum einstøkum føri hevur goldið 40% av rokningini umvegis rentustuðulin úr landskassanum, sigur Fíggjarmálaráðið í almennum skrivi.

Líkt er til, at Felagið Føroyskir Peningastovnar gloymir henda veruleika, tá felagið førir fram, at sethúsakundar frameftir fara at verða nógv verri fyri, nú rentustuðulin av provisjónum og ómaksgjøldum verður strikaður.

Stuðulin úr landskassanum til rentuútreiðslur hjá føroyskum sethúsaeigarum er næstan tvífaldaður seinastu trý árini. Frá 2006 til 2009 er rentustuðulin vaksin úr 85 mió. kr. upp í 167 mió. kr.

Hóast rentan er nógv lækkað seinastu tíðina, so sæst hetta næstan ikki aftur í útreiðslunum hjá landskassanum til rentustuðulin.

Ein orsøk til hetta er, at føroyskir peningastovnar hava tikið rættiliga høgar provisjónir og ómaksgjøld fyri at leggja vanlig sethúsalán um til realkredittlán, men tað er føroyski skattgjaldarin, sum hevur goldið 40% av ómakinum umvegis rentustuðulin úr landskassanum.

Rentustuðulin var upprunaliga ætlaður sum ein fíggjarligur stuðul til rentuúrtreiðslur hjá føroyskum sethúsaeigarum, men í hesum føri gera føroyskir peningastovnar sær beinleiðis dælt rentustuðlinum við at hækka sínar provisjónir og ómaksgjøld tilsvarandi og stinga rentustuðulin í egnan lumma.

Haldið tað tí vera rættiliga ússaligt, tá Felagið Føroyskir Peningastovnar førir fram, at peningastovnarnir ongan lut eiga í útreiðsluvøkstri landskassans. Útreiðsluvøksturin hjá landskassnum erubygnaðarligirtrupulleikar, sum politiska skipanin eigur at rætta, sigur Felagið Føroyskir Peningastovnar.

Politiska skipanin rættar ein bygnaðarligan trupulleika við at strika fíggjarliga stuðulin úr landskassanum til provisjónir og ómaksgjøld hjá føroyskaum peningastovnum.

Peningastovnarnir áttu heldur at tikið í egnan barm, og frameftir sjálvir goldið hesa rokningina, sum teir áður hava sent víðari til føroyska skattaborgaran.

Í sambandi við útreiðslurnar hjá landskassanum til rentustuðulin er eisini vert at viðmerkja, at sambært nýggjastu frágreiðingini hjá Landsbankanum er rentumarginalurin hjá føroyska peningastovnunum hækkaður umleið 1% seinastu tvey árini.




**NISSAN PATHFINDER 2.5 TD VØR.** 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** UE 385 **Km:** 34.000
**Árgangur:** mars 2007
**Útgjald:** 53.500 **Mðr. gjald:** 3.327 (5 ár)
**kr. 214.000,-**



**TOYOTA AURIS 1.6 LUNA** 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** FV 472 **Km:** 18.000
**Árgangur:** feb. 2008
**Útgjald:** 48.000 **Mðr. gjald:** 2.988 (5 ár)
**kr. 192.000,-**



**CITROEN BERLINGO 1.6** 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** MH 545 **Km:** 74.000
**Árgangur:** apríl 2005
**Útgjald:** 28.000 **Mðr. gjald:** 2.755 (5 ár)
**kr. 112.000,-**



**TOYOTA RAV4 2.0 VVT-I** 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** JG 132 **Km:** 55.000
**Árgangur:** feb. 2005
**Útgjald:** 49.500 **Mðr. gjald:** 3.071 (5 ár)
**kr. 198.000,-**



**TOYOTA COROLLA 1.4 D-4D STC.** 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** BG 753 **Km:** 80.000
**Árgangur:** jan. 2005
**Útgjald:** 36.000 **Mðr. gjald:** 2.250 (5 ár)
**kr. 144.000,-**



**BMW 320D DIESEL** 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** KU 300 **Km:** 150.000
**Árgangur:** juni 2002
**Útgjald:** 34.000 **Mðr. gjald:** 3.306 (3 ár)
**kr. 136.000,-**



**TOYOTA YARIS 1.3 LUNA M/M** 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** GB 420 **Km:** 36.000
**Árgangur:** august 2006
**Útgjald:** 34.000 **Mðr. gjald:** 2.125 (5 ár)
**kr. 136.000,-**



**YARIS 1.4 D4D LUNA DIESEL** 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** KT 175 **Km:** 101.000
**Árgangur:** mars 2006
**Útgjald:** 33.000 **Mðr. gjald:** 2.066 (5 ár)
**kr. 132.000,-**



**NISSAN PATROL 3.0 DIESEL** 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** JT 530 **Km:** 98.000
**Árgangur:** juli 2001
**Útgjald:** 31.250 **Mðr. gjald:** 3.047 (3 ár)
**kr. 125.000,-**



**TOYOTA AURIS 1.6 SOL** 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** SP 563 **Km:** 28.000
**Árgangur:** des. 2007
**Útgjald:** 49.500 **Mðr. gjald:** 3.071 (5 ár)
**kr. 198.000,-**

6 mánaða garanti

**Vit bjóða 6 mánaða garanti uppá bilar, ið kosta meira enn 85.000,-**
Garanti skipan, ið hevur eina sjálvsábyrgd uppá kr. 500,-, fevnir um allar knappliga íkomnar feilir, ið eyðsæð ikki skyldast nýtslu brúkarans, rust, uttanífrákomnir skaðar ella væntandi tænastueftirlit.
Eingin gandur og eingir smáir bókstavir.
**Kom og vitja okkum – landsins fremstu bilasølu.**

Brúktir bilar við
**lagaligari fígging**

**REYNI SERVICE** P/F
Vegurin Langi · Hoyvík · Tel 353040 · Fax 353041
Við Borðoyavík · Klaksvík · Tel 473040 · Fax 473041
T-postur: rs@reyniservice.fo · www.reyniservice.fo